

# Paradís portrið er opnað mær



JÓLAHUGLEIÐING

*Leysliga týtt:*
*Heri Joensen, prestur*

Jólaaftansmorgun var upprunnin. Fá vóru komin á føtur. Veðrið hevði verið av tí fagrasta, men knappliga brast hann á við kavaroki. Kavaælini gjørdust alsamt tjúkri, og veðrið vísti seg ikki at batna.

Anna búði í útkantinum av býnum. Nógv var at takast við og fáa frá hondini hendan jólaaftansmorgunin. Maðurin og børnini vóru farin við bilinum at koyra út jólagávurnar. Sjálv vaskaði hon gólvini og ruddaði tað, sum eftir var. Men tíðin gekk so skjótt. Anna hevði eina kenslu av, at alt hetta stríðið og øll hendan fyrireikingin líkasum forðaði henni at fyrireika hjartað til jólanna. Tað var eins og gloymdi hon jólini í øllum fyrireikingunum.

Hon hugdi út gjøgnum videygað, men har sást ongan veg fyri kavarokinum. Hon bað stutta bøn fyri skyldfólkunum, ið vóru á ferð runt býin við jólagávunum. Síðani fór hon aftur at rudda. Tá hon fór innar í stovuna og hugdi har út gjøgnum videygað, sá hon okkurt svart, sum fleyg har til og frá. Tá Anna hugdi betur, sá hon, at hetta var ein flokkur av smáfuglum, sum strídd-ust fyri lívinum har í illveðrinum. Fuglarnir royndu at finna sær skjól. Men teir fingu ikki flogið, og tí fuku teir aftur og fram. Summir fuku í vindeygað ella á húsið og kloydust.

Anna hugsaði nú, hvat hon skuldi gera. Hon skundaði sær fram í køkin, fekk fatur á fuglamatinum, tí hon var von at geva smáfuglunum, tá kavi var og kalt. Hon skundaði sær út í bilskúrin, stroyddi fuglamatin á góvið og opnaði stóru hurðina á bilskúrinum. Nú ansaðu fuglarnir eftir, at skjól var at finna. Teir flugu inn í bilskúrin, og tað var teirra bjarging.

Tá húsfólkini hjá Onnu vóru komin aftur til hús, legði hon frá sær arbeiðið og bað tey øll koma innar í stovuna. Nú fortaldi hon teimum, hvat hent var.

— Tað var hetta, sum Guð gjørdi fyri okkum á jólum, segði Anna. Hann bjargaði okkum, tá hann sendi Jesus niður á jørðina. Tá opnaði hann okkum skjól, sum er faðirsins opnu armar. Hetta hevði eg næstan gloymt sjálv í øllum stákinum. Jólini eru vissuliga stór gleðishátíð. Guð hevur givið okkum menniskjum skjól hjá sær.

Frelsari mín! Frelsari mín!
Náði tín hon er mítt skjól.
Paradísportrið er opnað mær,
aldri kann eg fulltakka tær
:,: fyri gleðilig jól. :,:

**1. «Gleðilig jól! Gleðilig jól!»**
**ljóðar av himli einglalag.**
**«Armi syndari, óttast ei nú,**
**gleðiboðskapin hoyrir tú:**
**:,: «Jesus er føddur í dag.» :,: »**

**2. Faðir vár! Faðir vár!**
**Høgt tó tú á himli býrt,**
**ikki gloymdi tú barnið títt,**
**elskaði syndiga hjarta mítt;**
**:,: veri um ævi tær dýrd. :,:**

**3. Frelsari mín! Frelsari mín!**
**Náði tín hon er mítt skjól.**
**Paradísportrið er opnað mær,**
**aldri kann eg fulltakka tær**
**:,: fyri gleðilig jól. :,:**

**Fr. Petersen 1891.**
**Lag: Sl. 84.**



# Fyribilsskattaskráin 2001
# Fríir ágóðar v.m.

Hjá teimum, sum hava ymisk framíhjárættindi sum part av lønini, ásetur Toll- og Skattaráð Føroya eina ferð um árið virðið á hesum lunnindum, og eru virðini fyri 2001 hesi, íroknað meirvirðisgjald:

| | | |
|---|---|---|
| a) Virðið á fríum bústaði: | | |
| íbúð (partur av húsum) pr. $m^2$ | kr. | 429 |
| íbúð (heil hús) pr. $m^2$ | kr. | 338 |
| b) Eginnýtsla av el | kr. | 6.200 |
| c) Eginnýtsla av olju | kr. | 13.200 |
| d) Frí telefon | kr. | 4.500 |
| e) Virðið á fríum kosti pr. dag: | | |
| 3 máltíðir | kr. | 79 |
| 2 máltíðir | kr. | 60 |
| 1 máltíð | kr. | 44 |
| f) Virðið á fríum bili: | | |
| 1100 kg og undir | kr. | 43.900 |
| 1101 kg til 1300 kg | kr. | 56.200 |
| 1301 kg og meira | kr. | 70.200 |
| Allir aðrir bilar, sí viðmerking | kr. | 32.925/21.950 |

**Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi**
Privatur vinnurekandi skal skatta av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skatta av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til privatnýtsluna, tá tað snýr seg um t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal gera eina neyva metan av, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla, og skal henda metan vera við atliti til støðd á t.d. húsi og húski.

Sum leiðbeinandi minstamark hevur Toll- og Skattaráð Føroya tí ásett hesi virði fyri nýttar vørur:

| | | |
|---|---|---|
| g) Eginnýtsla av vørum: | | |
| Bakarar | kr. | 6.400 |
| Bakarar við keypmansvørum | kr. | 8.400 |
| Keypmenn | kr. | 21.600 |
| Leiðbeinandi minstamark fyri privatnýtslu av bili hjá hýruvognsførara er | kr. | 15.300 |
| h) Virðið á partaeigaralánum hjá høvuðspartaeigarum: | | 10% |
| i) Kapitaleftirlønarfrádrátturin er hægst | kr. | 41.400 |
| j) Frádrátturin fyri donsk lesandi | kr. | 60.000 |

**Viðmerking til »Allir aðrir bilar« undir f)**
Omanfyri nevndu upphæddir eru galdandi fyri bilar skrásettir sum persónvognar smb. § 3 í 11. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum.

Fyri bilar skrásettir sum vørubilar eftir § 5 í 11. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 75% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Fyri aðrar bilar enn omanfyri nevndu t.d. bilar skrásettir eftir § 6 og § 8 í 11. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 50% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Toll- og Skattstova Føroya tilskilar sær rætt at krevja avrit av skrásetingarskjalinum fyri bilin.

*Tórshavn, 15. desember 2000*
**Toll- og Skattaráð Føroya**


*Vit ynskja*
*viðskiftafólki okkara*
*eini gleðilig jól*
*og eitt av Harranum*
*signað nýggjár,*
*við tøkk fyri gott samstarv*
*í skjótt farna ári.*

*Hotellið letur aftur 24. desember og verður opið aftur týsdagin 02. januar 2001.*

Hotel Føroyar Best Western
Tel. 317500
Sosialurin - 311820

SPØL Top 10
1 .Championship Manager 00/01
2. Red Alert 2
3. Fifa 2001
4. Delta Force: Land Warrior
5. The Sims /Livin'it up exp.
6. Diablo 2
7. Hitman: Codename 47
8. Sacrifice
9. Rune
10. Starship Troopers
TERA
box 49
600 Saltangará
Tlf 44 88 88

SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI
● Byrjanarundirvísing í føroyskum og enskum
● Altjóða skeið í samstarvi við Cambridge University
● Serskeið eftir ynski
Lætt, stuttligt, mennandi
Tel. 422574 - Fax 422521
www.depilin.fo
Sosialurin - 311820


## Kiosk til sølu

Um hóskandi boð fæst, er kiosk í Havn til sølu. Kann yvirtakast í januar.

Áhugað kunnu skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 242

## Tøkk

Eg vil hervið takka øllum, ið stuðlaðu meg til býráðsvalið.

Tíverri rakk eg ikki nóg langt fyri at verða afturvaldur, men míni 16 ár í býráðnum hava verið fyri meg nøkur góð ár.

Eina stóra tøkk til kaldbaksfólkið, sum hesaferð gjørdi eina rimmar roynd fyri at bygdin skuldi hava umboð, men eg rakk ov stutt.

Eg havi havt nakrar trúgvar stuðlar, hetta skulu tit hava takk fyri, bæði í Havn, Argjum, Syðradali, Norðradali, Kollafirði, Hvítanesi og í Kaldbak.

Eg vil ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Páll Petersen, Kaldbak**

## Filmseftirlitið

Avgreiðslan er stongd millum jól og nýggjár.

Vit á Filmseftirlitinum ynskja øllum viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

FILMSEFTIRLITIÐ


*Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólkum eini gleðilig jól og gott nýggjár við tøkk fyri tað brátt farna.*

**Málarameistararnir Falkenberg**

*Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og gott komandi ár.*

**Baldvin Baldvinsson**
**málarameistari**